# Tivoli vakrari enn nakrantíð

Tað verður gjørt nógv burtur úr at pynta Tivoli í Keypmannahavn. Stuttleikahavin, sum hevur nógv vitjandi um summarið, letur eisini upp í desember mánaði, og tá er alt jólaskrýtt.

Í ár verður serliga nógv gjørt burtur úr ljósunum, og tað verður sagt, at hetta er enn meira hugtakandi, enn tað hevur verið undanfarin ár.

Tað er virdi franski ljóslistamaðurin Stef Grivelet, sum hevur pyntað stóra jólatræið i Tivoli. Hann hevur brúkt eina ørgrynnu av smáum ljósdiodum, og hann brúkar eisini 200 spegl til at fáa enn størri effekt burturúr. Tveir mans brúktu tríggjar vikur um at pynta jólatræið við teimum mongu perunum, men úrslitið er eisini stórsligið.

Tivoli er eitt sindur øðrvísi í jólamánaðinum enn um summarið, tí alt er ikki opið í desember. Eini 72 jólabúðir selja alt, sum hoyrir jólunum til, og børnini kunnu royna eini 25 ymisk spøl.

Í ár hevur Tivoli eitt nýtt akvarium við saltvatni, har meira enn 1600 eksotiskir fiskar svimja í.

Tivoli hevur opið til 30. desember, men tað er stongt dagarnar 24. og 25. des.




























